NES KOMMUNA

650 Toftir · www.nes.fo · nes@nes.fo

## Barnagarðurin á Svangaskarði, Toftir søkir eftir 1 námsfrøðingi

Til Barnagarðin verður søkt eftir:

- **1 námsfrøðingi at arbeiða 30 tímar um vikuna í tíðaravmarkað starv, at seta frá 01. mars 2010 til 28. februar 2011, fyri námsfrøðing í barnsburðarfarloyvi.**

Barnagarðurin er ein ítróttarbarnagarður

Barnagarðurin hevur tríggjar stovur – Sóldøgg, Sólareyga og Sólarglottin.

Í barnagarðinum eru 56 børn.

Barnagarðurin liggur við stadionøkið á Svangaskarði, tætt við náttúruna og við nógvum møguleikum at vera úti.

**Vit ynskja at umsøkjarin:**
- Dugir at seta seg inn í støðuna hjá tí einstaka barninum
- Hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan dag saman við børnunum
- Hevur góð samstarvsevnir og kann taka ábyrgd
- Er við til at menna tað pedagogiska arbeiðið
- Hevur hug at røra seg og vera nógv úti í náttúruni

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið í skala 11 – 18

Um eingin námsfrøðingur søkir, verður hjálparfólk sett ístaðin.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til leiðarin í Barnagarðinum á tlf 448760/565021

**Umsóknir**

saman við prógvum og møguligum viðmælum skulu verða Nes kommunu í hendi í seinasta lagi 12. februar 2010.

**NES KOMMUNA**

**650 Toftir**
**www.nes.fo**
**nes@nes.fo**

Runavíkar kommuna

## Pedagogar til Dagstovnin í Skálafirði

Søkt verður eftir pedagogum til Dagstovnin at byrja 15. Feb. 2010 ella eftir nærri avtalu.

**Størvini at søkja er:**
2 pedagogar til Dagstovnin í Skálafirði 30 t/v. til 35 t/v. til vøggu- ella barnagarsstovu.

Á stovninum eru 2 vøggustovur og 1 barnagarðsstova. Vit eru ein stovnur undir Runavíkar Kommunu og halda til í leiðaðum hølum í Kelduni í Skálafirði.

Í aug. 2010 flyta vit í nýggjan stovn ávikavist á Skála og Søldafirði.

**Vit ynskja**
- At tú hevur hug at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag fyri børnunum.
- At tú hevur virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum og teim vaksnu.
- At tú við nýhugsan hevur hug, til at skapa og seta dám á okkara stovn.
- At tú hevur góð samstarvsevni og kann arbeiða sjálvsstøðugt.

**Setunarviðurskifti**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Hjálparfólk eru í starvinum, og verða verandi í teimum, um eingin pedagogur søkir.

Meiri fæst at vita um størvini við at venda sær til Nancy Poulsen, leiðara, á tlf. 212252

Umsóknir við avritum av prógvi verða at senda til:

Dagstovnin í Skálafirði
Skálafjarðarvegur 26
FO-485 Skálafjørður
Mail: dagsol@olivant.fo
www.123hjemmeside.dk/Dagstovnurin

Umsóknarfreistin er í seinasta lagi tann 08.02.2010, kl. 12.00

**Runavíkar kommuna**

# Pedagogar

Dagstovnurin Birkilund ynskir sær 3 pedagogar at starvast millum 30 og 40 tímar um vikuna. Størvini eru í vøggustovuni og verða sett 01.03.2010 ella eftir avtalu.

Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Birkilund er ein sjálvsognarstovnur við 33 børnum í vøggustovuni og 69 børn í barnagarði. Vit hava 7 stovur og 3 til 4 starvsfólk á hvørjari stovu.

At starvast á dagstovni, meta vit er eitt av heimsins týdningarmiklastu størvum. Birkilund leggur tí dent á at menna starvsfólkini. Vit luttaka á fleiri skeiðum, ráðstevnum og tiltøkum, bæði sum vit sjálvi skipa fyri og, ið verður bjóðað okkum.

Vit eru í støðugari menning, eindirnar eru lagdar saman í 2008 og vit eru í holt við at finna felags stev. Vit arbeiða við at tillaga menningarætlanirnar og arbeiða miðvíst við TRAS.

Vit bjóða eitt áhugavert og spennandi starv, har tú sleppur at verða við til at mynda títt dagliga arbeiði og gerandisdagin hjá børnunum.

Vit liggja í einum náttúruríkum umhvørvi tætt við Hoyvíkstjørn og við øllum sniðgøtunum á Konmansmýru.

**Vit ynskja at umsøkjarin:**

- Er útbúgvin pedagogur.
- Er fyrikomandi og erligur.
- Dugir at arbeiða sjálvstøðugt og ábyrgdarfult í samráð við børn og starvsfelagar.
- Heldur at arbeiðið á einari vøggustovu er spennandi og avbjóðandi.
- Dugir at síggja avbjóðingar fram um avmarkingar.
- Er nærverandi og dugir at lurta.
- Raðfestir foreldrasamstarv høgt.
- Vil verða við til at menna stovnin og arbeiða við tí vit seta okkum sum mál.

Meira fæst at vita hjá leiðaranum Katrin Bjarnadóttir á tlf 215458 ella hjá álitisfólkunum Jóhanna Laksá tlf 313131(vøggustovan) ella Allan Mortensen tlf 257832 (barnagarðurin)

Skrivlig umsókn við pedagogprógvi (um tú verður liðug í vár, er tú eisini vælkomin at søkja) og møguligum viðmælum, skal verða okkum í hendi seinast 10.02.2010

**Dagstovnurin Birkilund**
Hoyvíksvegur 41 B
FO – 100 Tórshavn


Bilur tín verður sum nýggjur

Vit gera smáskaðar, polera, bona og lakkforsegla bil tín við Nano Cover

Quick Repair

Á Hjalla · tlf. 21 33 23





Útgerðin á tannlæknastovu í Kollafirði til sølu

Útgerðin á tannlæknastovu míni í Kollafirði, er til sølu. Tannlæknastovan hevur 2 viðgerðarrúm umframt onnur tilhoyrandi hølir. Í sambandi við søluna er møguligt at leiga hølini til tannvirksemi í eina tíð.

Áhugað kunnu seta seg í samband við:

**Terja Davidsen, tannlækna**
**Traðaveg 3, 410 Kollafjørður**
**Tlf. 421418, fax 421406**
**t-post: terjed@kallnet.fo**





Joensen Auto El-verkstað

Vit umvæla og selja startarar og dynamo'ir til øll bilmerkir.

Vit testa eisini tín bil við landsins besta testara.

Joensen Auto El-verkstað

FO-370 Miðvágur · Tel. 211669